# Heystlega á Zarepta

**Fríggjakvøldið byrjaði heystlega á Zarepta fyri ung í aldrinum 14-17 ár. Umleið 200 luttakarar eru á leguni, sum varðar til mikudagin**

HEYSTLEGA
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Hetta er síðsta lega í summarskránni hjá Zarepta í ár. Í vetur vera tað mest vikuskiftislegur, har ymisku samkomurnar kring landið, hava húsið eitt vikuskifti hvør.

Skráin á heystleguni líkist rættiliga nógv skránni á summarlegunum, við tí undantaki, at árabátarnir, súkklubátarnir og kanoirnar eru tiknar upp fyri veturin.

Fleiri bíbliutímar og andaktir eru á skránni á leguni. Millum annað hevur Dánjal Petersen í morgun tosað um forholdið millum gentu og drong, sum er eitt evni, ið ofta verður tosað um á ungdómslegum.

Í annaðkvøld fara ung úr Eysturoynni at skipa fyri ungdómsmøti. Hesum møti standa tey ungu fyri og tað kemur at líkjast teimum ungdómsmøtum, sum leguluttakararnir eru von við úr teirra samkomum, við nógvum sangi, vitnisburði og talu.

Men alt á leguni er ikki líka álvarsamt. Í frítøtunum hava tey ungu møguleika at spæla fótbólt og kurvabólt, og tey plaga eisini at hugna sær á hoppipútuni og á spæliplássinum. Skipað verður eisini fyri lættari løtum í salinum, har tey ungu kunnu stuttleika sær saman og spæla ymisk spøl.




# Norrøna sigla á Klaksvík í vetur




NORRØNA
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Smyril Line og Klaksvíkar kommuna eru farnar at samráðast um, at Ánirnar skulu vera alternativ havn hjá Norrønu í vetur tá ikki ber til at koma inn á Havnina.

- Vit hava ikki gjørt nakra formella avtalu enn, men vit eru í dialogi við kommununa, sigur Tummas Magnussen, stjóri hjá Smyril Line.

- Vit hava valt at fylgja tilráðingini frá okkara skiparum, og teir meta, at Ánirnar eru besta alternativa havn til Norrønu, sigur Tummas Magnussen.

Tummas Magnussen væntar at avtalan kemur upp á pláss um nakrar dagar.

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, vil ongar viðmerkingar gera,

# Trupulleiki við internetinum

INTERNET
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Fríggjadagin hava fleiri internet brúkarar trupulleikar við at koma á netið. Brekið komst av trupulleikum við útgerðini

Trupulleikar vóru ymsa staðni í landinum, til dømis í Hvalba, Sørvági, Leirvík, Kunoy og við Gjógv.

Frá FT Net siga tey, at í teimum flestu støðunum virkaði netið aftur seint seinnapartin fríggjadagin og í Suðuroy virkaði tað aftur fríggjakvøldið, tá útgerðin til at rætta brekið var komin suður við Smyrli.

Einasta stað har internetið ikki kom aftur í rættlag í vikuskiftinum var í Sørvági, men har er brekið rættað mánamorgunin.


## Bygningur í Fuglafirði til sølu





Nótavirkisbygningur hjá Vónini á keiøkinum í Fuglafirði, verður seldur um hóskandi boð fæst.

Bygningurin er í tveimum hæddum. 1. hædd verður nýtt til framleiðslu, meðan grundhæddin verður nýtt til goymslu. Í bygninginum eru eisini skrivstova, kaffistova o.a.

Støddin av bygninginum er 880 m$^2$, har hvør hæddin er 440 m$^2$. Eisini er goymsluøki uttan fyri bygningin, ið er 125 m$^2$.

Áhugað kunnu venda sær til Hjalmar Petersen á tlf: 474210 / 354392



**Samskip í Føroyum bjóðar viðskiftafólki sínum flutnings- og goymsluloysnir við tilhoyrandi tænastum, bæði í Føroyum og úti í heimi. Samskip er partur av Samskip HF. Hjá Samskipum starvast 1.400 fólk á 59 skrivstovum í 23 londum. Samskip hevur tvey skip skrásett í FAS. Tvær linjur sigla uppá Føroyar. Til og úr Føroyum verður silgt til Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg, Aarhus, Reykjavík og Reyðarfjørðin.**




## STARV INNAN SHIPPING OG SKRIVSTOVU

Fyri eitt av starvsfólkum okkara í barnsburðarfarloyvi, søkir Samskip eftir dugnaligum og ágrýtnum fólki til skrivstovu okkara í Havn. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. desember 2006 til 31. desember 2007. Fyri rætta viðkomandi kann tó verða talan um fast starv eftir hetta.

**Vit bjóða** eitt starv í shipping og skrivstovuarbeiði í út- og innflutningi, kundaavgreiðslu og øðrum innanhýsis og uttanhýsis uppgávum. Í arbeiðinum samskiftir tú við starvsfólk og viðskiftafólk í Føroyum og við systirfyritøkur úti í heimi. Tú kemur at starvast í einum lokalum og altjóða kappingarumhvørvi saman við einum ungum og dynamiskum toymi.

**Vit vænta** at tú hevur viðkomandi útbúgving og royndir. At umsøkjarin er nærlægdur, miðvísur og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lyklaorð. Vit vænta at tú dugir væl at samskifta á enskum.

**Løn** sambært avtalu, treyta av útbúgving og royndum.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Joel undir Leitinum, stjóra á telefon 308811.

**Umsókn við CV** skal sendast til: Samskip, Box 3255, FO-110 Tórshavn. Brævbjálvin skal merkjast "umsókn". Umsóknarfreistin er 23. oktober.

SAMSKIP

Yviri við Strond 23 · 100 Tórshavn · Tel 30 88 00 · Fax 30 88 01 · www.samskip.com